# Skerda stavrað Árna

SJÚRÐUR SKAALE



**Allar atfinningarnar hjá Árna Dahl móti uppskotinum um alfabetið hanga í leysum lofti. Men kanska hann, sum tann fyrsti nakrantíð, kundi sagt hví tað er so umráðandi, at vit útihýsa fimm bókstavum?**

Týdningarmesta atfinning Árna er, at grundarlagið undir uppskotinum er skeivt. Hann sigur at: "Í viðmerkingum sínum rør løgtingsmaðurin fram undir, at bókstavir sum x, z, c og w eru bannaðir í føroyskum tekstum."

Men eg havi aldrin hvørki sagt ella róð fram undir, at hesir stavir eru bannaðir. Havi tvørturímóti víst á, at teir verða sera nógv brúktir í Føroyum. Og at teir júst tí skulu vera í alfabetinum.

Tað er hinvegin ein sannroynd, at roynt hevur verið at lúka hesar stavir burtur úr fólkanøvnum. Og eftir mínum tykki eiga bæði William, Alexandur og Carl Jóhan heimarætt í okkara skriftmáli...

**Málnevndin**

Onnur atfinning Árna er, at løgtingið við hesi lóg fer at "máa støðið undan eini skipan, tað sjálvt hevur samtykt". Hann sipar til Málnevndina og vísir á, at hon er "sett m.a. at taka sær av spurningum sum hesum".

Tað er rætt. Men Málnevndin tekur undir við, at umrøddu bókstavir skulu við í føroyska alfabetið.

Í 1994 kom út skúlaorðabókin Orðaskyn. Har stóð eitt alfabet við øllum stavunum í. Og tað varð góðkent av Málnevndini.

Um vikuskiftið hava eisini bæði fyrrverandi og núverandi formenn í Málnevndini sagt, at teir útihýstu bókstavirnir eiga at fáa innivist í alfabetinum.

Men hóast hetta læra flestu børnini ta amputeraðu útgávuna av alfabetinum, sum m.a. er at síggja í mállæruni hjá Paulivari Andreasen og Árna sjálvum. Og hetta alfabet er, sum eg skilji, eisini góðkent av Málnevndini.

Vit hava altso tvey "autoriserað" alfabet. Men samstundis er eitt heilt triðja alfabet tað, sum mest verður nýtt. Og tað er tað klassiska ABC'ið!

Tað hevur nevniliga ikki eydnast at fáa føroyingar at siga AÁBDÐ í staðin fyri ABCDE. Og eg vænti ikki tað fer ikki at eydnast, tí klassiska stavraðið er líka internationalt og fyri mong okkara líka náttúrligt sum talraðið. Vit siga 1,2,3 og vit siga A,B,C. Og vit fara aldrin at siga nakað annað.

Eg haldi sum heild ikki, at vit eiga at lóggeva um málfrøðiligar spurningar. Men her er so stór fløkja íkomin, at hon eftir mínum tykki má greiðast við lóg.

**Glíðibreytin**

Síðani spyr Árni hvat tað næsta verður: "Skal løgtingið lóggeva, um børn skulu rættast, skriva tey fimleikur fyri gymnastik ella sjónvarp fyri fjernsyn?"

Eg giti at hann skilir, hví eg ikki tími at svara hesum. Eg kundi við størri rætti spurt Árna hvør næsti bókstavur er, sum hann vil hava útihýstan. Er tað S, sum nú skal rekast av landinum? Ella K?

**Málstevnunevdin**

Árni undrast eisini á, hví álitið frá Málstevnunevndini ikki er komið fyri tingið enn.

Hann hevur rætt í, at tað líkist ongum. Vit ætlaðu at leggja tað fram nú, men landsstýriskvinnan boðaði beint eftir ólavsøku frá, at hon kemur við tí heilt skjótt.

**Tjóðarmál**

Árni heldur eisini at løgtingið, heldur enn at fingist við alfabetið, átti at syrgt fyri, at føroyskt verður viðurkent sum tjóðarmál.

Sum Árni helst veit, verður í heyst síðsta hond løgd á nýggja stjórnarskipan fyri Føroyar. Og tað er eingin loyna, at full semja hevur verið og er um eina áseting um málið, sum øll munnu fegnast um.

**At enda**

Eg vil føroyska málinum væl. Tað vil Árni sanniliga eisini.

Eg haldi tað skaða málið, at vit læra børnini eina skerda útgávu av latínska alfabetinum. Eina útgávu, sum ikki endurspeglar veruleikan. Eg skilji ikki hví hetta skal vera so. Og eg havi ongantíð hoyrt eina ta einastu skilagóða grundgeving fyri tí. Hinvegin eru nógvar góðar grundir til, at vit skulu nýta alfabetið í fullum líki. Tað mest avgerandi er sjálvandi ikki hvar serføroysku stavirnar standa, men at allir stavirnir eru við.

Men eg eri bara leikmaður. Árni hoyrir til málsins fremstu røktingarmenn. Og hann verjir tað skerda alfabetið, sum stóð tað um lív.

Tað kundi tí verið sera áhugavert um hann - sum tann fyrsti nakrantíð - alment kundi greitt frá, hví tað er so umráðandi, at fimm bókstavir skulu mangla í tí alfabeti, sum okkara børn læra í skúlanum.

# Kenna ikki síni egnu børn

BJØRT SAMUELSEN
løgtingskvinna



Tingbólkaformaður Javnaðarfloksins boðar nú brádliga frá, at Javnaðarflokkurin ikki góðtekur, at minstupensjonistar verða mótroknaðir frá fyrstu forvunnu krónu. Áhugavert, tí tað er formaður floksins og fíggjarmálaráðharrin hjá samgonguni, sum er komin í tingið við uppskotinum. Ikki at kennast við síni egnu børn, er vorðið dagsins rættur frá ABC.

John Johannesen legði í útvarpinum stóran dent á, at mótrokningin í pensjónini hjá fyritíðarpensjonistum var "uppskotið frá landsstýriskvinnuni í almannamálum".

Men Rósa Samuelsen hevur hinvegin fleiri ferðir alment sagt, at hon hevur verið noydd at góðtaka uppskotið, og svølgja henda herska bitan, tí hann er partur av politiskari avtalu. Samstundis fer løgmaður út og sigur, at Rósa sjálv má finna uppá okkurt annað, nú tað eru so mong, sum eru ímóti at knokkroyta fyritíðarpensjonistarnar.

Allir royna sostatt at fráskriva sær faðirskap at barninum, sum Rósa sigur seg einki eiga í! Men uppskotið er altso komið frá landsstýrinum, tað vil siga, umframt frá Fólkaflokkinum, Javnaðarflokkinum og javnaðarfíggjarmálaráðharranum, eisini frá løgmanni sjálvum. So íðin sum løgmaður var at forhondsselja "eg-veit-ikki-ordeliga-hvat-verður-í-men-tað-verður-gott-pakkan" hjá landsstýrinum, so má løgmaður hava kent hvørt komma, áðrenn pakkin varð lagdur fram. Og tað sama munnu flestu samgongulimir hava gjørt. Talan var ikki júst um nakra bagatell.

**Hóp-lúripassaríð**

Samgongumenn hava lúripassað, segði fíggjarmálaráðharrin, vónsvikin av, at fleiri samgongulimir loypa á pakkan, hóast teir hava havt ríkiliga av tíð til at ávirka og broyta tingini, áðrenn hann kom í tingið.

Tá nú flokkurin hjá fíggjamálaráðharranum heldur ikki vil kennast við partar av pakkanum, má tað jú merkja, at Javnaðarflokkurin allur hevur lúriðpassað, og so sanniliga - eisini løgmaður sjálvur.

**Kanska henda - ella handavegin**

Løgmaður sigur, at vit enn einaferð skulu bíða eftir einum pakka – hesaferð eftir einum vinnupakka. Tað gera vit so. Ímeðan vit eisini bíða eftir einum uttanríkispolitikki.

Ímeðan uttanríkisráðharrin kallar EFTA fyri "ein vitalan felagsskap undir støðugari menning", kallar løgmaður alment felagsskapin fyri ein bindiklubba. Meinar løgmaður at vit skulu stríðast fyri at koma í ein bindiklubba? Og hví skuldi EFTA yvirhøvur latið dyrnar upp fyri einum landi, hvørs hægsti leiðari skýrir handilsfelagsskapin vera fyri kaffitystar bindikonur?

Í fiskivinnupolitikkinum hava vit júst sæð, at hóast bæði B, C og partar av A siga seg vilja munadyggar broytingar, og løgmaður enntá lovar burðardygga vinnu innan 2 ár (!!), so sleppur ein minniluti í samgonguni at ráða yvir okkara høvuðsvinnu. Hvør bestemmar? Hvør tekur avgerðirnar? Hvør sker ígjøgnum, so glitrandi orðini hjá løgmanni síggjast aftur í veruligum politiskum gerðum? Ongin – ella bara onkur?

Orðini hjá løgmanni um at røgva í takt og teamarbeiði standa eftirhondini eftir sum innantómt orðaskvaldur. Og tað er til stórt spell fyri tær góðu kreftir, sum hóast alt eru í partum av samgonguni. Fá kunnu vera í iva um, at í ABC er hvørki stýrimaður ella skipari á brúnni. Úrslitið er, at samgongan ikki kennir síni egnu børn.

# Ja, í politikki kann alt henda

BJØRN KALSØ
løgtingsmaður



**Svar til viðmerkingar frá Jóannes Eidesgaard, landsstýrismanni til greinina: "Javnaðarflokkurin gongur ímóti sínum egna formanni"**

Sær út til at alt kann henda í politikki. Ikki minst viðmerkingarnar, sum Jóannes Eidesgaard ger í svari til greinina: "Tingmanning Javnaðarfloksins gongur ímóti sínum egna formanni" bera boð um, at so er. At Jóannes nú er farin at ilskast inn á onnur, sum halda tað verða lítið sømuligt og løgið, at ein heil tingmanning gongur ímóti sínum egna floksformanni, ber tó prísin. Átti heldur harta sínar egnu.

Vónandi er hetta dupultspælið í pensiónsmálinum ikki eitt tilvitað polittiskt stunt frá Javnaðarflokkinum, sum hevur til endamáls at lýsa eina støðu, har ið øll hini ætlaðu at gera nakað ræðuligt og ósosialt, men Javnaðarflokkurin fekk alt aftur á beint. Eingin hevur jú enn havt møguleika at seta síni politisku merki á málið enn, uttan formaður Javnaðarfloksins og harvið Javnaðarflokkurin. Hinir flokkarnir hava enn ikki verið við í viðgerðini, sum Jóannes eisini sigur í svari sínum.

At onnur ikki hava arbeitt við broytingum í okkara pensiónskipan, eitt nú Bárður Nielsen, nevndi eg als einki um í greinini. Kenni tó einki til politiskar niðurstøður frá tí arbeiðnum, um hækkandi pensiónsaldur og mótrokningar frá fyrst tjentu krónu í pensiónini, soleiðis sum tað liggur í kortinum í Ólavsøkuppskotinum frá Jóannesari síðu.

Geri ikki meira við skrivingina um hetta mál á hesum sinni, men fari sum altíð at leggja upp til uppbyggjandi samstarv eisini pensiónsuppskotinum viðvíkjandi.

